

## Claus fær sekkin

Dagarnir hjá føroyska landsliðsspælaranum Claus Bech Jørgensen í Coventry í næstbestu eingilsku deildini tykjast at vera taldir. Venjarin, Micky Adams, hevur boðað Claus frá, at hann ikki roknar hann millum spælararnar, sum hann fer at dúva upp á næsta kappingarár. Claus og Coventry eru sáttmálabundin í eitt ár afturat, men Micky Adams hevur sagt við Claus Bech Jørgensen, at hann einki hevur ímóti tí, at Claus fer úr felagnum.

– Eg eri ikki púra ovfarin av hesum. Síðani á jólum havi eg havt eina kenslu av, hvønn vegin tað hevur borið. Eg havi møguleika at halda meg til sáttmálan og at stríðast fyri mínum møguleika, sigur 30 ára gamli Claus Bech Jørgensen, sum fyri stuttum hevur keypt hús í Coventry, við danska dagblaðið BT.

## ÍF Føroyar vann oddadyst

Føroyska útisetafelagið í Keypmannahavn, ÍF Føroyar, leikti í gjár ímóti FB (Frederiksberg Boldklub), sum er oddalið í Københavnsserien, og føroyingarnir í Keypmannahavn vunnu dystin 1-0. Einasta málið í dystinum skoraði Jørgin Meitilberg, tá hann varð hægstur eftir fríspark frá Heina í Skorini. Málið kom í 93. minutti, og tí var sjálvsagt stór frøi á føroyingunum á Frederiksberg Idrætspark.

1.lið hjá ÍF Føroyum liggur í løtuni á fimta plássi, men bert trý stig eru upp til oddaliðið, sum also er dagsins mótstøðulið av Frederiksberg.

# Óstøðug úrslit í OL

**Føroyska landsliðið hevur higartil ikki staðið seg serliga væl í talvolympiaduni í Torino**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*
*Carl_eli@hotmail.com*

Eftir sjey umfør í 37. talvolympiaduni í Torino í Italia hava Føroyar 14 stig. Seks umfør resta í.

14 stig kundi ljóðað sum eitt higartil gott úrslit, men hyggja vit at mótstøðuni, er úrtøkan einki serlig at reypa av. Stórsigurin sunnudagin ímóti Macau er tó sjálvsagt nakað at fegnast um og somuleiðis ein ábending um, at vend er komin í heldur soltnu úrslitini. Føroyar eru styrkismettar nr. 80 og eru í løtuni á deildum 75. plássi. 148 lond telva við í OL.

Favorittarnir úr Russlandi (Vladimir Kramnik (2729) mannar 1. borð) eru á 2. plássi við 20 stigum, meðan Armenia – við Levon Aronian (2756) – er fremst við 21 stigum. Kuba er nr. 3 við 19,5 stigum.

Sviar og danir standa seg higartil væl við 18,5 stigum og deildum 8. plássi. Magnus Carlsen og hansara norsku liðfelagar hava 17 stig, meðan íslendarar einans hava 14 stig.

### Helgi mest brúktur

Liðleiðarin á føroyska landsliðnum er Finnbjørn Vang. Hann er somuleiðis varaforseti í Talvsambandi Føroya. Finnbjørn hevur fyrr roynt seg sum liðleiðari, nevniliga í 1998, tá ið OL varð telvað í Elista í Kalmykia.

Helgi Dam Ziska hevur sum tann einasti á føroyska liðnum telvað øll sjey talvini. Hann hevur 3,5 stig, og tað er heilt góðari leið. Helst hevur Finnbjørn givið Helga fullan stuðul og møguleika at telva øll umførini orsakað av góða viðrákinum seinasta árið og orkuni hjá 15 ára gamla stórtalentinum.

Maðurin á 1. borði, John Arni Nilssen, hevur ikki havt eina serliga góða fyrru helvt. Men sigurin í 7. umfari hevur ivaleyst givið honum sjálvsálitið aftur. John Arni hevur 2,5 av 6 møguligum.

Føroyameistarin Martin Poulsen hevur kanska skuffað mest. 1,5 stig av 5 er ikki nøktandi. Miðalmótstøðan hevur tó verið hørð, nærum 2400 í rating.

### Mr. OL

John Rødgaard er toppskorari við 4 stigum av 6. John hevur altíð, síðani hann fyrstu ferð umboðaði Føroyar í 1984, havt góðar OL-kappingar, og tíbetur tykist góða gongdin at halda fram. Eftir eina trilvandi byrjan, hevur John vunnið seinastu trý talvini og hevur nú telvað omanfyri sína væntaðu skoru.

Hans Kristian Simonsen er sloppin ofta fram at talvborðinum í hesari olympiadu. Eykamaðurin hevur sanniliga tikið av møguleikanum, tá ið føstu telvararnir hava snávað. Hans Kristian hevur 2,5 stig av 4.

Í 8. umfari mánadagin hitta Føroyar Tatjikistan, ið er styrkismett nr. 106. Tatjikistan hevur ein stórmeistara og ein altjóða meistara á liðnum, men sum heild eru teir kortini veikari enn føroyska liðið á pappírinum.

### Einkultúrslitini:

| | |
|---|---|
| John Arni Nilssen | 2,5 av 6 |
| Martin Poulsen | 1,5/5 |
| John Rødgaard | 4,0/6 |
| Helgi Dam Ziska | 3,5/7 |
| Hans Kristian Simonsen | 2,5/4 |



*Tað hevur verið sera misjavnt, hvussu úrslitini í Torino hava lagað seg*

### Føroysku dystirnir í Torino

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1. umfar** | | | | | | | | | |
| **Borð** | **80** | | **Faroe Islands** | **Rtg** | **-** | **8** | **Netherlands** | **Rtg** | **0:04** |
| 1 | IM | | Nilssen John Arni | 2356 | - | GM | Tiviakov Sergey | 2669 | 0 - 1 |
| 2 | | | Poulsen Martin | 2325 | - | GM | Nijboer Friso | 2584 | 0 - 1 |
| 3 | IM | | Rodgaard John | 2344 | - | GM | Van Den Doel Erik | 2579 | 0 - 1 |
| 4 | | | Ziska Helgi D. | 2306 | - | GM | L'ami Erwin | 2565 | 0 - 1 |
| **2. umfar** | | | | | | | | | |
| **Borð** | **119** | | **Liechtenstein** | **Rtg** | **-** | **80** | **Faroe Islands** | **Rtg** | **0:04** |
| 1 | | | Mannhart Marcel | 2173 | - | IM | Nilssen John Arni | 2356 | 0 - 1 |
| 2 | | | Ferster Fabian | 2061 | - | | Poulsen Martin | 2325 | 0 - 1 |
| 3 | | | Guller Andras | 2085 | - | IM | Rodgaard John | 2344 | 0 - 1 |
| 4 | | | Schadler Martin | 2170 | - | | Ziska Helgi D. | 2306 | 0 - 1 |
| **3. umfar** | | | | | | | | | |
| **Borð** | **80** | | **Faroe Islands** | **Rtg** | **-** | **65** | **Austria** | **Rtg** | **1:03** |
| 1 | IM | | Nilssen John Arni | 2356 | - | IM | Neubauer Martin | 2454 | 0 - 1 |
| 2 | | | Poulsen Martin | 2325 | - | IM | Pilaj Herwig | 2403 | ½ - ½ |
| 3 | IM | | Rodgaard John | 2344 | - | IM | Danner Georg | 2402 | 0 - 1 |
| 4 | | | Ziska Helgi D. | 2306 | - | IM | Alvir Aco | 2382 | ½ - ½ |
| **4. umfar** | | | | | | | | | |
| **Borð** | **108** | | **Botswana** | **Rtg** | **-** | **80** | **Faroe Islands** | **Rtg** | **2½:1½** |
| 1 | FM | | Khetho Phemelo | 2238 | - | IM | Nilssen John Arni | 2356 | 1 - 0 |
| 2 | | | Gaealafshwe | 2125 | - | IM | Rodgaard John | 2344 | 0 - 1 |
| 3 | | | Njobvu Ignatious | 2236 | - | | Ziska Helgi D. | 2306 | 1 - 0 |
| 4 | | | Pitlagano Tebogo | 2161 | - | | Simonsen Hans | 2295 | ½ - ½ |
| **5. umfar** | | | | | | | | | |
| **Borð** | **77** | | **Bolivia** | **Rtg** | **-** | **80** | **Faroe Islands** | **Rtg** | **1:03** |
| 1 | IM | | Zambrana Oswaldo | 2425 | - | | Poulsen Martin | 2325 | 1 - 0 |
| 2 | FM | | Berrocal Jorge | 2343 | - | IM | Rodgaard John | 2344 | 0 - 1 |
| 3 | IM | | Cueto Jhony | 2318 | - | | Ziska Helgi D. | 2306 | 0 - 1 |
| 4 | FM | | Molina Jorge Luis | 2239 | - | | Simonsen Hans | 2295 | 0 - 1 |
| **6. umfar** | | | | | | | | | |
| **Borð** | **80** | | **Faroe Islands** | **Rtg** | **-** | **70** | **Italy B** | **Rtg** | **½ : 3½** |
| 1 | IM | | Nilssen John Arni | 2356 | - | FM | Ronchetti Niccolo | 2419 | ½ - ½ |
| 2 | | | Poulsen Martin | 2325 | - | FM | Brunello Sabino | 2339 | 0 - 1 |
| 3 | | | Ziska Helgi D. | 2306 | - | FM | Rombaldoni Denis | 2322 | 0 - 1 |
| 4 | | | Simonsen Hans | 2295 | - | FM | Cacco Christian | 2322 | 0 - 1 |
| **7. umfar** | | | | | | | | | |
| **Borð** | **125** | | **Macau (MAC)** | **Rtg** | **-** | **80** | **Faroe Islands** | **Rtg** | **0:04** |
| 1 | | | Silveirinha Jose | 2126 | - | IM | Nilssen John Arni | 2356 | 0 - 1 |
| 2 | | | Celis Solomon | 2079 | - | IM | Rodgaard John | 2344 | 0 - 1 |
| 3 | | | Fesalbon Rolando | 2113 | - | | Ziska Helgi D. | 2306 | 0 - 1 |
| 4 | | | Mak Keng Kei | 2040 | - | | Simonsen Hans | 2295 | 0 - 1 |

## Talvið hesa vikuna

**Simonsen, Hans K. (2295) - Molina, Jorge L. (2239)**
37. Olympiadan Torino (5. umf.), 25.05.2006

**1.e4 c6 2.Ric3 d5 3.Rif3 Bg4 4.h3 Bxf3 5.Fxf3 e6 6.a3 dxe4 7.Rixe4 Rid7 8.b4 Rigf6 9.Bb2 Rixe4 10.Fxe4 Rif6 11.Ff3 Fd5** (Svartur tykist hava trygga og sunna støðu) **12.Be2 Be7 13.Fc3 Rd8 14.0–0–0 0–0** (14…b5 sær sterkt út. Hans Kristian slapp við lítla hvøkkinum og velur sjálvur at fara í álop) **15.Bc4 Fd6 16.g4! b5 17.g5 bxc4??** (Boliviumaðurin leyp beint í felluna. 17...Rie8 var einasti leikur) **18.gxf6 Bxf6**

**Støðumynd eftir 18…Bxf6**



**19.Fxf6!** (Molina gavst orsakað av: 19...gxf6 20.Rhg1+ Kh8 21.Bxf6 skák og mát) **1–0**